Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Læknahúsini (Gula húsið)

Spurningar:

1. Nær verður verklagslógin fyri læknahúsini (Gula húsið) løgd fyri Løgtingið?
2. Hvørjar forðingar eru fyri, at lógin kann leggjast fyri Løgtingið?
3. Nær kann væntast, at arbeiðið at dagføra læknahúsini byrjar?
4. Nær verður starvsfólkabygningurin dagførdur?

Viðmerkingar:
Klaksvíkar Sjúkrahús og Landsverk hava gjørt eina ætlan um at dagføra gomlu læknahúsini, soleiðis at umsitingin kann flyta úr starvsfólkabygninginum og í gula hús. Samstundis verður arbeitt við uppskoti um, hvussu starvsfólkabygningurin kann verða innrættaður.
Tað er stórur tørvur á, at fólk kunnu búgva nærhendis sjúkrahúsinum, meðan tey eru til venjingar. Herfyri frættist, at tey, ið higartil hava gist í starvsfólkabygninginum, meðan tey hava fingið endurvenjing, ikki hava henda møguleika í løtuni orsakað av soppi í bygninginum og tí ikki fingu alneyðugu endurvenjingina.
Sostatt hevur tað stóran skund at fáa bæði verklagslóg fyri gulu húsini samtykta og at fáa sett ferð á innrætting av starvsfólkabygninginum, so avbygdafólk aftur kunnu koma til endurvenjingar og gista.

Á Løgtingi, 16. desember 2021

Eyðgunn Samuelsen